## Nógv fingið bót

Seinastu tvær vikurnar hevur løgreglan gjørt umfatandi ferðslukanningar kring alt landið. Endaligau uppgerðin er ikki liðug enn, men løgreglan sigur, at nógvir bilar eru kannaðar og tíverri var úrslitið eisini, at hjá nógvum vóru viðurskiftini ikki ílagi. Løgreglan sigur, at sostatt hava nógvir bilførarar fingið bót. Flestu bøturnar eru skrivaðar til bilførarar, sum ikki hava havt ljósini í lagi. Bótin fyri lyktafeil er 400 krónur og so er ongin munur á um tað er nummarplátuljósið, ella høvuðsljósið, sum ikki lýsur. Hinvegin stóð rættiliga væl til við dekkunum. Annars hava bilførarar fingið bót fyri at ikki at brúka trygdarbelti, fyri ikki at hava koyrikort o.s.fr.




## Klakvíkskvinnur í Smiðjuni

Hósdagin lata listakvinnurnar Lydia Petersen og Gull-Britt Hansen úr Klaksvík upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Líka síðani áttatiárini hava tær báðar sýnt fram, bæði saman við øðrum og eisini sum einstaklingar, men hetta er fyrstu ferð tær báðar sýna fram saman. Gull-Britt hevur í mong ár starvast sum pedagogur og dámar væl at skapa, klippa, seyma, mála og annað. Lydia sum er frisørur, arbeiðir dagliga við litum og stílráðgeving. Hon ferðast landið runt og skiftir stíl á kundunum og dámar somuleiðist at skapa.hon málar akvarellir, ger klippmyndir, áseyming og annað. Fransýningin er opin fram til 20. november.

# Høgni fer til Danmarkar



*Jón Brian Hvidtfeldt, Elin Winther Poulsen og Rigmor Dam stýrdu livandi politiska propaganda tiltakinum í Miðlahúsinum og Rás 2 við kønari hond*

**Spildurnýggj veljarakanning, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin, vísir, at Tjóveldi fær fyrsta fólkatingssessin, meðan ivi er um hvør fær seinna sessin. Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin liggja allir javnir**

FÓLKATINGSVAL

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Í gjár, sunnudagin 11. November, vóru 558 veljarar kring landið spurdir, hvønn flokk og hvønn persón teir ætla at atkvøða fyri á valinum í morgin. 13 prosent høvdu ikki tikið støðu, meðan Tjóðveldi var greiður vinnari við 25,6 prosent av atkvøðunum.

Kappingin um seinna sessin er púra jøvn millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin. Hesir flokkar fáa ávíkavist 21,7 og 20,6 og 20,1 av atkvøðunum, men munurin í millum teir er so lítil, at talan er um statistiskan ótryggleika.

Úrslitið frá kanningini gevur eisini áhugaverdar ábendingar um styrkisbýtið innanhýsis í flokkunum. Har millum annað Edmund Joensen og Karsten Hansen liggja langt frammanfyri floksformonnunum í Sambandsflokkinum og Miðflokkinum.

### Vandamiklar kanningar

Til seinasta fólkatingsval vísti ein Gallup kanning, at Javnaðarflokkurin var fremsti flokkur. Men tá valið var av, var flokkurin dottin niður millum hinar og endaði sum nummar trý.

Sambært Jógvan Mørkøre kann hetta millum annað koma av, at veljarakanningar ávirka veljarar. Stríðið stendur um einans tveir sessir til fólkatingið, og tá fólk síggja veljarakanningar og halda, at ein flokkur er tryggur, ynskja tey at ávirka, hvør fær seinna sessin.

Kanningin hjá Sosialinum í dag vísur, at Tjóðveldi fær fyrsta sessin við 26 prosentum av atkvøðunum, meðan kappingin um seinna sessin er heilt jøvn millum tríggjar flokkar.

- Men vandin er, sum sagt, at ein veljarakanning ávirkar, og harða kappingin millum teir tríggjar flokkarnar kann vera ein hóttan ímóti tryggu føringini hjá Tjóðveldinum, sigur Jógvan Mørkøre

### Kaj Leo veikasti formaður

Fynd vísir eisini innanhýsis býti í flokkunum. Fólk vóru spurd, um tey høvdu gjørt av, um tey atkvøddu persónliga ella upp á listan, og hvat valevni, tey ætlaðu at velja. Úrslitið vísir, at Høgni Hoydal er sterkasti floksformaður, meðan Kaj Leo Johannesen stendur veikast.

Høgni Hoydal fær 45 prosent av øllum tjóðveldisatkvøðum, Jóannes Eidesgaard fær 21 prosent av javnaðaratkvøðunum, Jørgen Niclasen fær 22 prosent av fólkafloksatkvøðunum, meðan Kaj Leo einans fær 11 prosent av sambandsatkvøðunum.

Jógvan Mørkøre sigur, at Kaj Leo Johannesen altíð hevur ligið lágt í kanningum, og at henda kanningin gevur honum betri úrslit enn aðrar. Og hóast Edmund Joensen ikki hevur verið høvðusvalevni til hetta valið, so hevur hann fyrr verið valdur inn á Fólkating og hevur verið nógv frammi í seinastuni í samband við málið um Føroyar sum eitt valdømi.

Munurin millum Jørgen Niclasen og Óla Breckmann er so lítið, at íroknað statistiskan ótryggleika, liggja teir púra javnir. Men samanborið við formannin í Sambandsflokkinum, tykist nýggi formaðurin í Fólkaflokkinum at standa rýmiliga sterkur.

### Karstin sterkast í Miðflokkinum

Innanhýsis tølini fyri Miðflokkin og Sjálvstýrisflokkin eru statistisk ótrygg, tí grundarlagið er so lítið, men tey eru áhugaverd alíkavæl, tí í Sjálvsstýrisflokkinum hevur formaðurin valt ikki at stilla upp, og

## Innanhýsis býti í flokkunum í prosentum

**Hava tygum gjørt av, um tygum atkvøða persónliga ella upp á listan?**

**(Um ja): Íðan, hvat atkvøða tygum?**

| Fólkaflokkurin | | Sambandsflokkurin | | Javnaðarflokkurin | | Tjóveldisflokkurin | | Sjálvstýrisflokkurin | | Miðflokkurin | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Jørgen Niclasen | 22 | Edmund Joensen | 16 | Jóannes Eidesgaard | 21 | Høgni Hoydal | 45 | Listin | 31 | Karsten Hansen | 42 |
| Óli Breckmann | 20 | Listin | 13 | Listin | 17 | Tórbjørn Jacobsen | 11 | Sámal Petur í Grund | 31 | Jenis av Rana | 21 |
| Listin | 10 | Kaj Leo Johannesen | 11 | John Johannessen | 10 | Listin | 10 | Kári á Rógvi | 31 | Bill Justinussen | 13 |
| | | Alfred Olsen | 10 | Helena D. á Neystabø | 10 | Annita á Fríðríksmørk | 10 | Rúna Sivertsen | 7 | Listin | 8 |